## DAGSINS MEINING

# Frændavitjan

Í gjár tann 31. august undirskrivaðu íslendski uttanríksráðharrin og løgmaður fríhandilsavtaluna, sum leingi hevur verið verið ávegis.Hetta er mest víðgongdi sáttmáli, Føroyar hava gjørt við nakað land, og fyrstu ferð føroyingar gera sáttmála har vørur, tænastur, kapitalur og persónar hava frítt at fara landanna millum.

Tað verður nú frítt fyri føroyskar fyritøkur at seta seg niður í Íslandi og fyri íslendskar fyritøkur at seta seg niður í Føroyum.

Við hesum sáttmála gerast Føroyar og Ísland sostatt eitt búskaparøki, tí flestu handilsligu forðingar fella burtur. Hetta er tó ikki galdandi fyri týdningarmikil øki innan fiskivinnuna, men partarnir hava avtalað eisini at arbeiða fyri at fáa hesar forðingar av vegnum.

Hetta er ein sera týðandi hending í viðurskiftunum millum Ísland og Føroyar. Hóast tað má sigast at vera eitt sindur av einum vónbroti, at sáttmálin ikki fevnir um fiskivinnuna, so má avtalan metast sum ein týðandi varði í viðurskiftum okkara við brøðratjóðina í útnorði. Hvat er meira upplagt, enn at grannalondini samstarva á øllum økjum?

Sáttmálin kann, um hann verður tikin í tí álvara, sum hann hveur uppiborið gerast tann kveikin, sum skal til fyri at fáa gongd á samstarvið. Talan er um vinnuligt og búskaparligt samstarv, mentanarsamstarv og samstarv innan útbúgving og gransking. Her hava vit nógv at læra av frændum okkara og tí eiga øll at fegnast eins væl og vit við hesum ynskja mæta Føroyavininum Davidi Oddsyni hjartæliga vælkomnum til okkara land.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til spariætlan á Landssjúkrahúsinum

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
*Jana H. Dalsgaard, forkvinna*



Nevndin í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (FFS) hevur á nevndarfundi í dag umrøtt ætlaðu sparingarnar á Landssjúkrahúsinum (LS). Hesar sparingar, ið verða kallaðar umleggingar, raka flest allar funktiónir, soleiðis at brúkarin eftir øllum at døma fær eina verri tænastu.

Nevndin í FFS er als ikki samd við leiðsluna á LS, um hon metir, at ætlaðu broytingarnar ikki fara at geva eina verri tænastu.

Vit heita á Føroya Løgting og Landsstýri at tryggja Føroya fólki eitt virðiligt tænastustøði og eftirlýsa samstundis ein yvirskipaðan heilsupolitikk.

Soleiðis fær brúkarin at vita, hvørji krøv kunnu setast heilsuverkinum, nú landsins myndugleikar hava stungið út í kortið við "Visión 2015".

# Serstovnurin er ætlaður til børn við serligum funktiónsólagi

**Terje Kollsker**
*Psykologur á psykiatriska deplinum*



Í grein í Dimmu 23. aug. »Russsisk rouletta við børnum« úttala limir í áhugafelagnum MBD/ DAMP seg um, hvat ætlaði serstovnurin ikki kann, og at tað ikki verður ein stovnur til børn við eini sjúkugreining samstundis sum felagið úttalar, at ongin serkunnleiki er til taks í Føroyum.

Psykologfakligi leiðarin á Psykiatriska Deplinum hevur í grein fyrr í vikuni upplýst um virksemi á deplinum, so mær nýtist ikki at taka uppí saman, men skal her í stuttum lýsa, hvat vit, sum hava arbeitt við álitinum um serdagstovn til børn upp til 7 ár, hava mett sum týðandi upptøkukrøv, altso, hvørji børn vit hava hugsað um.

Fyrst skal eg tó minnna á, at vit hava serkunnleika í Føroyum. Á teimum økjum hesin eigur at verða mentur, skal gongd setast á, sjálvandi. Við stovnsetan av serstovni er menning av fakligum serkunnleika í Føroyum eisini partur av íløguni. Tað er ikki bara innan fiskiídnaðin, at diskussiónin um útflutning ella viðgerð av ráværu hevur týdning fyri góðskumenning her á landi.

Børnini, ið eru ætlað at fáa gagn av serviðgerð á stovninum, eru børn við funktiónsólagi á tí sokallaða psyko-sosiala økinum. Børnini skulu vera psykologiskt kannað og mett til at hava neyðugan tørv á serligari viðgerð.

Avgerandi upptøkukrøv vera, at barnið hevur evnir innnan fyri sonevnda normaløkið, men við serligum trupulleikum á funktiónsøkjum, ið eru av avgerandi týdningi fyri samspælið við onnur og í menningini sum heild.

Nøkur eyðkenni fyri hesi børn vilja ofta vera, at tey hava ólag í evnunum til bindindi, hava lyndi til at hava ófrið á sær, kunnu vera brásint, hava ilt við fyriliti, koma ofta í konflikt og eru ofta fyri, at samskifti við onnur gerst sera negatívt. Slíkar negativar lívsroyndir aftrat funktiónstrupulleikunum, setir barnið í stóran vanda fyri skaðilig árin á persónligu menningina, um ikki viðgerðartilboð er til taks.

Í nógvum førum fara hesi børn helst at hava eina diagnosu, ið er samsvarandi teimum børnum oman fyri nevnda áhugafelag umfatar.

Í øllum førum skulu foreldrini samstarva tætt við stovnin. Foreldur at børnum við álvarsligum funktiónsólagi hava brúk fyri og gagn av hjálp av ymiskum slagi, eisini tey vælfungerandi foreldrini. Í onkrum føri kann talan vera um truplan foreldraførleika og onkuntíð kann væntast, at hesi børn longu eru í familjupleygu. T.v.s., at baklandi hjá børnunum kann síggja sera ymist út, hóast barnsins tørvur á viðgerð á stovninum er á leið tann sami.

Stovnurin fer tí eisini at hava sum uppgávu, at hava hjálparfunktiónir, ið eru rættaðar móti familjuni, júst fyri at gera viðgerðina av barninum so góða sum gjørligt.

Børnini, ið ætlandi skulu hava gagn av viðgerðini á serstovninum, skulu tískil fyrst lúka nøkur upptøkukrøv, har dentur er lagdur á serligt funktiónsólag hjá barninum - og ikki hjá foreldrunum. Síðani verður viðgerðin, primert tað serpedagogiska arbeiðið, sjálvandi í tráð við barnsins tørv. Aftrat hesum er upptøkukravið um tætt samstarv við foreldrini.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.